# HEILSANIR



**Góði Eyðun**
Tillukku við degnum. Takk fyri eina góða summarferiu.
**Durita**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 26. august. Takk fyri í summar. Eisini ein heilsan til abba.
**Ynskja Mirjam, Rita, Marta og Jóhannes M.**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum 27/8. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Bestu ynskir Knút, Oluf og Jón Marni**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum. Eisini ein heilsan til langommu. Takk fyri at tit eru so góðar við okkum.
**Heilsan Emma og Jákup Andrias**



**Góðasta Anja**
Tillukku við 14 ára degnum. Jesus signi teg.
**Omma**



**Góði Eyðun**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum 27. august.
**Mamma og babba**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, ið mintust til mín á konfirmatiónsdegnum 8/4.
**Bestu ynskir Knút Johannesen, Skála**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 26. august. Takk fyri at tit eru so góð við okkum.
**Abbabørnini**



**Góða elskaða Anja**
Tillukku við 14 ára degnum.
**Heilsan mamma, babba, Janus, Hjørtur og Bjarti**



**Góði fitti Hákun á Norðasta Horn**
Tillukku við 3 ára føðingardegnum.
**Bestu heilsanir omman, abbin og Teitur**



**Hey tit tríggir**
Hjartaliga tillukku við 40 ára døgunum.
**Ynskja vit**



**Hey hann sjálvur**
Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum.
**Ynskja vinir**



**Góða fittasta Anja**
Tillukku á tínum 14 ára degi. Vit síggjast.
**Karis, Lisa, Silja og Filip**



Babu-babu-babu-babu-baaabu!! Tillukku Jóhannis.
**Ynskja vit á BH 14**



# TILTØK

## FØÐINGAR

10. august fingu Torgerð Dam og Johnny Poulsen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2900 gr.

14. august fingu Osla Jacobsen og Jan Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3310 gr.

17. august fingu Jónfríð Jóanesarson og Hans Olivur H. Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3000 gr.

17. august fingu Birita og Jógvan Lassen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3800 gr.

18. august fingu Elisabeth Hentze og Hans Albert Hansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4500 gr.

20. august fingu Súnfríð og Rógvi Jacobsen, Toftir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

21. august fingu Herborg Godtfred Nielsen og Ivan Nielsen, Hirtshals, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3120 gr.

22. august fingu Elisabeth og Eiler Hansen, Leirvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4250 gr.

Osva Olsen og Ingar Svanberg, Vestmanna hava fingið eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

23. august fingu Randi Simonsen og Karsten Jespersen, Norðdepli, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

23. august fingu Elsa Gaardbo Lützen og Mogens Lützen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr.

27. juli fekk Mia H. Smith eina lítlasystur. Hon vág 3340 gr. og var 51 cm. long.



## ANDLÁT

**15. august**
Símun Petur Dalheim, Norðragøta, 92 ár

**16. august**
Pól Akraberg, Vestmanna, 96 ár

**18. august**
Mathilda Nøhr Jensen, ættað úr Havn, búsitandi í Hareskov, 87 ár

**19. august**
Gunnvør Samuelsen, ættað úr Norðragøtu, búsitandi í Havn, 64 ár.
Regin Bjørgheim Joensen, Tvøroyri, 68 ár

## Læknavaktir

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 25. aug.: Pól Jóhs. í Horni, 44 40 38
Sunnudagin 26. aug.: Magnus á Stongum, tlf. 42 30 06

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

**Gudstænastur**
*11. sunnud. e. trinitatis*
Porkeri: kl. 12, altarg., Erland Beder
Tvøroyri: kl. 11 Ólavur Rasmussen
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10, Christianskirkjan: kl. 11, Norðoya røktarheim: kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Fuglafjørður: kl. 11, familjugudstænasta,
Hellur: kl. 17, altarg., Uni Næs. (Í Leirvíkar og Elduvíkar kirkju gongur talvan fyri ytri missión)
Havnar kirkja: kl. 11, (Talvan gongur fyri KFUM í Havn). Sonja Klein
Kaldbak: kl. 12, altarg., Sverri Steinhólm
Sjóvar kirkja: kl. 11, familjugudstænasta (Talvan gongur fyri ljóðføri), Jóna Thomsen, barnaráðgevi og Jógvan Fríðriksson
Funningur: kl. 12 messa, Emil Olsen
Fríðrikskirkjan: kl. 11, altarg., Æðuvík: kl. 17, Jónsvein Bech
Gøta: (Talvan gongur fyri ytri missión)
Kvívík: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Hvalvík: kl. 12, altarg., Marjun Bæk
Sandavágur: kl. 11, altarg., David Johannesen
Glyvrar: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
Kirkjubøur: kl. 12, Heri Joensen
Leirvík: kl. 11, familjugudstænasta, Regin Høgnesen (Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan á staðnum).
Skopun: kl. 12, Jákup R. Hansen

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 17.30 bønarløta, kl. 18 møti v/ Thomas Dam, øll eru hjartaliga vælkomin. Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Katólska kirkjan**
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Jacques Adams í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 26. august kl. 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**»Tíð til Gud«**
Vit koma saman úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Dánjal av Rana hevur ein boðskap til okkara nú hann aftur skal á bíbliuskúla. Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mikukvøldið kl. 21 bønar og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 sunnudagsskúlin byrjar aftur, kl. 18 evangeliski fundurin byrjar aftur eftir summarfrítíðina. Aftaná er felagsnátturði í kjallaranum.

**Rhema á Hálsi**
ATAP-Barnaklubbin verður fríggjadagin kl. 18-19.30. Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Kristian Hentze.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti v/Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti – kvinnurnar skipa fyri, kl 22 útimøti v/Samkomuni í Hoyvík.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 bíbil- og bønarmøti.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18 møti.

**Meinigheitshúsið í Sandavági**
Sunnukvøldið kl. 18 møti við John W. Myllhamar, trúboðara.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin kl. 14.30, og møti verður kl. 18.00 við Tórbjørn Láadal o.ø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Sundalagi**
Í morgin kl. 17 bønarmøti, kl. 18 útimøti. Mikudagin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin kl. 14. Møti verður kl. 19 við Gunnar Reynslág. Øll eru vælkomin.

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður í Arbeiðarafelagshúsinum »Hæddini« Saltangará, sunnudagin kl. 17.00 við David Bech.
Morgunbøn er mána-, mikuog fríggjamorgun kl. 6-7.
Húsmøti verður týskvøldið kl. 19.00 hjá Anthony og Charles Johansen, Saltangará.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi, Margeir Toftegaard luttekur.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Jan Jacobsen. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við breyðbróting, Pauli Høj talar. Barnamøti kl. 11. Evangeliskt møti kl. 19. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6: Bøn, leygarmorgunin kl. 9: bøn, sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 20 : bønarmøti.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Jaspur Hansen. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti, innsavnan verður.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 luttaka Karin og Kurt Nielsen og skopuningar. Ver vælkomin og hugna tær við einum kaffimunni. Leygarkvøldið letur caféin upp kl. 20 og kl. 21 hevur Ragnar Ludvík ungdómsmøti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Karl og Elidu Kenning. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Samvirkinum í Porkeri. Karin og Kurt Nielsen og skopuningar luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti og kl. 18 evangel. møti, Karin og Kurt Nielsen og skopuningar luttaka.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

**Guð náði meg syndara!**

*Luk. 18, 9: »…nakrir, sum litu á seg sjálvar, at teir vóru rættvísir, og roknaðu hinar fyri einki.«*

Tað slagið av menniskjum er ikki óvanligt. Og tey eru ikki einsamøll um at halda, at tey eru tað rætta slagið av menniskjum. Ofta finnst ein heilur bólkur ella ein flokkur, kannska ein tjóð ella eitt ættarslag, sum gevur teimum rætt. Tað er djevulsins avskeplan av nøkrum góðum, sum Guð hevði lagt niður í mannanáttúruna: Rættarkensla, heiðursgirnd, skylduvitska, samfelagsábyrgd, vilji til at gera rætt. Hvat ið tey halda uppá er fyri ein stóran part rætt. Hvat ið tey døma eftir og halda seg frá, er ofta skaðiligt og skammiligt. Og tó verður okkurt fullkomiliga skeivt við øllum.

Henda sjálvrættvísin kann vera politiskt litað. Tey, sum hoyra til okkara flokk, okkara hugsjón, eru tey røttu. Hini eru sjálvsøkin, eirindaleys, valdsjúk, í frægasta føri blindaði. Ella sjálvrættvísin kann vera tjóðskaparlig. Hini hava ikki somu mentan, ikki sama virkishug, ikki sama sinni fyri skipan og skili, ikki somu rættvísu samfelagsskipan sum vit.

Men Jesus sigur okkum í sunnudagstekstinum, at sjálvrættvísin kann vera gudrøkin. Og kann hon tá vera serstakliga ónd. Hon kann vera so inngrógvin, at vit ikki varnast hana, heldur ikki tá ið Jesus setir farisearan í halgidóminum fram fyri okkum. Vit eru so von við at seta farisearanar hinumegin, millum skálkarnar og illmennini í lívinum. Og teirra millum eru vit sjálvi sjálvandi ikki.

Hvussu skal ein gudrøkin fariseari síggja út í dagsins veruleika? Hann skuldi gingið í kirkju ella á møti, verið høgt mettur, samvitskufullur og alment virdur. Hann skuldi hildið seg til lóg og rætt, goldið skatt sín og avgjøldini, virt ferðslureglarnar og røktað arbeiði sítt samvitskufullt. Hann skuldi verið av teirri sannføring, at hann var ein syndari sum fólk flest, men hann skuldi verið væl vitandi um, at hann ikki var ein sovorðin syndari sum øll hesi ábyrgdarleysu, óreinu og niðurundirkomnu fólk, sum tað finnast so nógv av nú á døgum, og sum løgreglan sambært hansara óreingiligu hugsan átti at tikið sær meira harðliga av. Hann skuldi kannska eisini takka Guði fyri, at hann ikki var soleiðis, sum tey eru í teimum harðrendu londunum.

Myndin kann skifta. Best sæst hon í spegili. Tí øll hava vit eina gamla menniskju innan í okkum, sum altíð hevur hug til at halda seg vera toluliga rættvísa og hava góðan rætt til at vanvirða nøkur onnur. Tað er gagnligt at síggja ta myndina av okkum sjálvum. Hon kann hjálpa okkum til av hjarta at siga sum tollarin: Guð náði meg syndara!

**Niels Pauli Danielsen**